# Skipasmiðjan á Skála P/F

**søkir eftir leiðara til stáldeildina.**

**Starvið:**
Sum leiðari av stáldeildini á virkinum fær tú ábyrgdina av øllum fakttekniskum spurningum. Leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við tilvísing til tekniska leiðaran og stjóran. Leiðarin av stáldeildini skal saman við leiðarunum av hinum deildunum á virkinum og leiðsluni annars, vera við at menna virkið fakliga og tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Leiðarin skal í samstarvi við onnur vera við til at samskipa arbeiðið á skipasmiðjuni til gagns fyri bæði viðskiftarfólk, starvsfólk og virkið sum heild.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at skipa og leiða dagliga arbeiði á stáldeild virkisins.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði, fylgja hesum upp og saman við leiðsluni annars samskipa ymisku arbeiðini frá byrjan til enda.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera sjakformonnum, starvsfólki, kundum o.ø. til hjálpar í fakttekniskum spurningum.
- at vera við í tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er skipsbyggjari ella hevur líknandi útbúgving.
- hevur royndir innan stál- og skipasmíð.
- hevur leiðsluroyndir sum formaður ella líknandi og dugir at skipa og leiða arbeiði til gagns fyri starvsfólk, viðskiftafólk og virkið.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina sundur fakligar spurningar, viðgerða møguleikar saman við øðrum, taka avgerðir og seta hesar í verk.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði í einum spennandi umhvørvi við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála P/F
att.: Marni Olsen
FO-480 Skála.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 31. juli 2002.

SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA

www.faroeyard.fo
skala@faroeyard.fo

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og har starvast umleið 75 fólk.

Sosialurin
Sosialurin i

# Skipasmiðjan á Skála P/F

**søkir eftir tekniskum leiðara**

**Starvið:**
Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at vera driftsleiðari og samskipa tær ymisku uppgávurnar.
- at vera tekniskt tengilið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum.
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert førur fyri at taka avgerðir.
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála
att.: Marni Olsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 31. juli 2002.

www.faroeyard.fo
SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA
skala@faroeyard.fo

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og har starvast umleið 75 fólk.

Øll hava eina góða síðu
– pop.fo hevur 100






# Vikarur

Søkt verður eftir vikari tíðarskeiðið 19. august til 11. oktober 2002 fyri lærara, sum hevur barnsburðarfarloyvi.

Fult vikutímatal við hesum lærugreinum:
Danskt, enskt og tilevning ( 8. - 10. flokkur)

Starvið verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu sendast til Felagsskúlan á Oyrarbakka í seinasta lagi 1. august 2002.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum tlf. 42 30 98.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
Postbox 20
FO-400 Oyrarbakki

**Mentamálaráðið**

# Summarfrí

Frá mánadegnum 22. juli til fríggjadagin 2. august 2002 er Mentamálaráðið stongt vegna summarfrí.

Tórshavn, tann 15. juli 2002
**Mentamálaráðið**

# Kunngerð
## frá útskiftingarnevndini fyri Hvalvíkar bygd

Næsti útskiftingarfundur verður í róðrarneystinum í Streymnesi hósdagin 25. juli kl. 10.00.

Nýggjur fyribilsplanur verður framlagdur.

N. v.
**Øssur A. Midjord**
útsk. form.

# Grót fæst

í Havn við at gjalda fyri lessing og koyring.

ARTICON

Tlf. 350700

# Summarfrí

Vegna summarfrí er kommunuskrivstovan stongd frá mánadegi 22. juli til fríggjadagin 9. august.

**Sunda Kommuna**
460 Norðskála

# Advokatfulltrúi søkist

Søkt verður við hesum eftir advokatfulltrúa at byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Bæði nýggir løgfrøðingar og løgfrøðingar við royndum kunnu søkja.

Vit vænta, at viðkomandi hevur eina góða ástøðiliga barlast og hevur teldukunnleika á brúkarastøði, eins og góður kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

Harumframt vænta vit, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert, men ofta sera strævið starv við nógvum skiftandi arbeiðsuppgávum.

Skrivstovan arbeiðir serliga við rættarmálsviðgerðum og ráðgeving til fyritøkur innan- og uttanlands, kommunur og almennar stovnar.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður lønt eftir nærri avtalu.

Stutt umsókn saman við prógvum skal sendast til:

**Annfinn V. Hansen, adv.**
Bryggjubakki 22, boks 106,
110 Tórshavn
tlf. 359595 · telefax 359596

# Útbjóðing

Felagsskúlin á Oyrarbakka bjóðar við hesum koyringina av skúlanæmingum út.

Talan er um tríggjar leiðir: Hósvíkarleiðina, Tjørnuvíkarleiðina og Eiðisleiðina. Til ber at bjóða upp á eina leið, tvær ella allar tríggjar.

Útbjóðingartilfar og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 423098.

Møgulig tilboð skulu verða Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 1. august 2002 kl. 15.00.

Felagsskúlin skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
Postbox 20
FO-400 Oyrarbakki

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan afturlatin
frá 22. juli til 2. august.
Telefonavgreiðsla verður tó
í vanligari skrivstovutíð á tel. 282919.

Opið er aftur mánadagin 5. august.
Avgreiðslutíðin mánadag-fríggjadag
kl. 09.-16.00.

**FØROYA LÍVSTRYGGING**

# Pedagogar
## til Bústovnin og Sambýlini í Runavík

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlunum í Runavík, eru tvey pedagogstørv leys at søkja til setan 1. aug. 2002 ella eftir nærri avtalu.

Størvini verða sett sum tænastumannastørv eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, fyri tænastumanna lønt stigini 24–31 eftir lønartalvu pr. 01.03.02.

Á Bústovninum á Rúnarvegi búgva seks menningartarnað fólk og á Sambýlinum á Rúnarvegi koma eisini 6 lættari menningartarnað fólk at búgva. Harumframt hoyrir Sambýlið á Líknagøtu 1 eisini til stovnin. Uppgávan hjá starvsfólkunum, sum nú verður søkt eftir, verður at hjálpa og vegleiða íbúgvarnar á Sambýlinum á Rúnarvegi í øllum tí, sum tey hava tørv á. Tit fáa við tykkara pedagogisku vitan áøgvarnar av at menna íbúgvarnar m.a. til at húsast saman í felagsskapi hvør við annan.

Arbeiðið á einum slíkum sambýli krevur áræði og fleksibilitet og at tú setur teg føran fyri at menna íbúgvarnar til bæði innanhýsis viðurskifti og at klára seg úti í samfelagnum.

Vit vilja at tú saman við okkum vil innrætta og skapa sambýlið til eitt heim, soleiðis at vit øll trívast og á ein pedagogiskan hátt tryggjar at okkara menningarmøguleikar koma í fyrstu røð, og finna útav saman, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Vit vilja eisini, at tú skal hava samskifti við okkara avvarðandi og tey, sum vit umgangast dagliga. Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at kunna fáa aðrar uppgávur aðrastaðni í skipanini, um tørvur gerst á tí.

Ert tú áhugaður í at uppbyggja og seta í verk og ganga nýggjar leiðir, so send eina umsókn við avriti av prógvum innan 24.07.2002. Eru spurningar til starvið, kunnu tit venda tykkum til leiðaran á tlf. 448424.

Umsóknir skulu stílast til:
**Sambýlið á Rúnarvegi**
Att.: leiðarin
Rúnarvegur 3
FO-620 Runavík

# Sethús á Kambsdali

119 m² til sølu. Grundøki 697 m². Byggiár: 1989.

**Tlf. 444187 ella 253987**

# Landsverkfrøðingurin

Sagt verður frá, at asfaltverkið og skerverkini eru stongd í summarfrítíðini frá 22. juli til 19. august.

LANDSVERKFRØÐINGURIN